Fylgis LM-063/2025

umhvørvisstovan
FAROESE ENVIRONMENT AGENCY

Umhvørvismálaráðið
Gongin 7
100 Tórshavn

Argir, 24. september 2025
Málsnr.: 25/25811
Tykkara málsnr.: 23/01930
Málsviðgeri: BJ

Hoyringarsvar frá Umhvørvisstovuni til uppskot til veðurlagslóg

Umhvørvisstovan, sum er náttúru-, umhvørvis- og orkumyndugleiki, hevur hesar viðmerkingar til uppskot til veðurlagslóg.

Umhvørvisstovan tekur undir við, at Føroyar fáa eina veðurlagslóg við bindandi málum og vegleiðing frá óheftum ráði við serfrøðingum.

Eisini er Umhvørvisstovan samd í, at tað er neyðugt at fyribyrgja oyðileggjandi avleiðingar av veðurlagsbroytingum fyri fólk, fæ og lívfrøðiliga margfeldið, og at grøna orkuskiftið er ein fortreyt fyri at røkka málinum um netto null útlát í 2025.

Umhvørvisstovan metir, at tað hevði verið gagnligt, um stigvís og tíðarsett mál vóru ásett í lógini, umframt málið fyri 2050. Slík áseting hevði styrkt eftirlitið og gjørt tað møguligt at fylgt framdráttinum betri.

Eisini heldur Umhvørvisstovan tað vera ynskiligt, at ásett verður í lógini, at landstýrisfólkið í umhvørvismálum skal leggja fram regluligar frágreiðingar um gongdina á orku- og veðurlagsøkinum, til dømis eina ferð um árið ella annað hvørt ár. Slíkar frágreiðingar kunnu viðvirka til, at Føroyar støðugt arbeiða seg fram ímóti settum málum.

Viðvíkjandi ætlanini at seta á stovn eitt veðurlagsráð metir Umhvørvisstovan tað vera týdningarmikið, at eitt tílíkt ráð tekur fakliga støðu til og ráðgevur í mun til orku- og veðurlagspolitikk, virkisætlanir og átøk fyri *á besta hátt* at røkka sett mál.

Umhvørvisstovan metir, at tað er av stórum týdningi, at Veðurlagsráðið hevur eina breiða bakgrund og førleikar, sum umboða bæði orku-, náttúru- og samfelagslig sjónarmið.

Umhvørvisstovan vil fegin svara spurningum og ivamálum. Vinarliga setið tykkum í samband við okkum, um tit hava tørv á fleiri upplýsingum ella nágreiniligum viðmerkingum.

Vinarliga

Sigurð í Jákupsstovu
Stjóri